LM-099/2023

Fylgiskjal 9

Hoyringsskriv til uppskot til Løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu frá Visit Runavík (ein kommunal kunningarstova í Runavíkar kommunu)

§2 allýsingar

Lýsingin av hvat eitt ferðafólk er, átti at verið allýst.

§6 Ferðavinnuætlan

Í §6 stendur, at 'Ferðavinnuætlanin skal gerast saman við serstøku ella staðbundnu nevndini.': Tað er ógreitt hvussu tann staðbundna nevndin er skipað, og hvørjar funktiónir hon hevur. Tað verður sera trupult at fáa eina staðbundna nevnd til at gera eina ferðavinnuætlan. Limir í staðbundnu nevndini hava onnur yrki enn at arbeiða við ferðavinnu, harumframt eru staðbundnu nevndirnar ymiskt samansettar. Tí mæla vit til, at í teimum kommununum, ið hava eina (almenna) kunningarstovu, er tað kunningarstovan, sum ger eina ferðavinnuætlan, sum fer til hoyringar í staðbundnu nevndini og hjá eigarum ella brúkarum, og í samráð gera broytingar um neyðugt.

Tað er tó umráðandi, at økini fáa hóskandi tíð til at gera ferðavinnuætlanir og semja er millum kunningarstovu, kommunu og staðbundnu nevnd.

Útreiðslur av at gera og halda ferðavinnuætlan, umsita skilhaldsreglur og inntøkur

Fyrireikingararbeiðið til at gera ferðavinnuætlanir hevur nógvar útreiðslur við sær. Útreiðslur til at seta verkætlanarfólk at hava ábyrgd, samskipa arbeiðið, og eisini útreiðslur til t.d. at gera kanningararbeiði, seta torleikastig, verndar- og trygdarmetingar, fuglakanningar o.s.fr. Tað er umráðandi, at kommunur/økir fáa eina hóskandi upphædd til at gera ferðavinnuætlanirnar. Hvørt øki má, í minsta lagi, seta eitt fulltíðar starvsfólk við hóskandi førleikum at arbeiða við ferðavinnuætlanum, og eftirfylgjandi, mugu starvsfólk setast at umsita skilhaldsreglur, ferðavinnuætlanina, inntøkurnar frá náttúrugjaldinum o.s.fr. Her má fígging setast av til økini til umsiting, eins og 1,5 mió. eru settar av til Uttanríkis- og vinnumálaráðið at gera støðumetingar og býta peningin.

Sum útgangsstøði kundi man sagt 1 mió. fyri hvørt øki, men havast skal í huga, at støddin á kommununum er ymisk, og tí má upphæddin variera.

Viðmerkingar til §6, stk. 3

Kommunurnar eru ymiskar í vavi, Runavíkar kommuna hevur 15 bygdir. Vit mæla til, at kommunan hevur heimild til at skipa sínar egnu ferðavinnuætlanir. Sum alternativ kundu man býtt øki upp í *ferðavinnubygdir* og *ikki-ferðavinnubygdir*, og á tann hátt kundi man havt eina ferðavinnuætlan fyri hvørja bygd fyri seg. T.d. kann ein ferðavinnuætlan gerast fyri Funning góðkennast áðrenn ein ferðavinnuætlan er gjørd fyri Elduvík. Tvs. at fyrsta ein ferðavinnuætlan fyri bygdina kann góðkennast áðrenn ein yvirskipað ætlan fyri alla kommuna er klár.

§7 Staðbundnu nevndirnar

Hetta vendir heilt øvugt. Kommunalar kunningarstovur gera eitt uppskot til hvussu ferðavinnan eigur at vera skipað, og hvussu peningurin skal umsitast. Hetta fer til hoyringar hjá staðbundnu nevndini, og í samráð verða justeringar gjørdar. Í summum bygdum er miðalaldurin sera høgur, og í øðrum bygdum er fólkatalið sera lágt, og vitanin um ferðavinnu er ikki altíð nøktandi til at umsita og gera tilmæli/ferðavinnuætlan. Semja skal tó sjálvandi vera millum allar partar.

Vit meta, at tað skuldi verið sett nøkur krøv til hvussu staðbundnu nevndirnar verða valdar og samansettar, tí tað kann koma fyri, at nevndin ikki er breitt umboðandi. *Tí halda vit at tað átti verið nøkur krøv sett, at tað skulu vera í minsta lagið tríggir limir, har hvør limur annaðhvørt umboðar hagar, bygdafólki og ferðavinnuna.* Her er kunningarstovan ein sjálvsagdur samstarvspartur.

§8 Tá ið nýggjar gøtur skulu gerast uttangarðs, skal friðingarmyndugleikin uppí. Tað kann hugsast at taka langa tíð at fáa loyvi at fara í gongd við arbeiðið at gera gøtur, umframt at friðingarmyndugleikarnir fáa eina munandi økta arbeiðsbyrðu. Hetta eigur tí at verða tikið til eftirtektar, tá ið man ásetur nær lógin skal koma í gildi.

§13 vit mæla til, at náttúrugjaldið verður hækkað, tí kommunur hava sera nógvar útreiðslur av nýggju lógini.

§14 Er ætlanin at spyrja fólk við komu hvørja kommunu tey skulu vitja? Hetta ljóðar sum eitt sera umfatandi arbeiði.

Eyka til §13 (bls. 18). Cruise-skip

Viðvíkjandi cruise-skipum, er neyðugt at skilja millum cruise-skip, ið koma at størri góðkendari havn, og smærri ekspeditión-skipum, ið vitja smærri bygdir, t.d. Funning og Elduvík.

Til vitjanir á bygd verður vanligt ein umsókn um dispensatión send Vinnumálaráðnum. Hesar hava higartil verið góðkendar, tí cruisevitjanin er skipað sum eitt burðardygt lokalt projekt, har allar inntøkur fella lokalt; hagar, bygdafólk, fornminnisfeløg, bygdafeløg, kirkju

Upphæddin, sum verður innkravd frá cruise skipunum á bygd er langt omanfyri 150 kr pr. fólk. Tí meta vit, at tað í hesum føri er óneyðugt at leggja 150kr omaná upphæddini, ið longu er uml 800 kr. Kommunan má í hesum førum fáa alla heimild at skipa slíkar lokalar bygdavitjanir.

Viðvíkjandi størri vitjanum, t.d. í Runavíkar Havn, meta vit, at kommunan/havnin skal hava heimild til at umsita inntøkurnar.

Talan er í hesum føri um transitgestir ið vitja størri øki, td. Runavík. Gestirnir, ið ikki fara við skipaðum túrum, eru bert í økinum(býnum) tvs. tey fara ikki í hagan ella vitja smærri bygdir. Runavíkar kommuna saman við Runavíkar havn tekur longu ábyrgd av cruise-gestum, og skipar fyri tiltøkum og ger býin kláran at taka ímóti gestunum. Tískil gevur tað mest meining, at (Runavíkar) kommuna/havn, sum hevur nógvar útreiðslur av at skipa havnarøkið og býin, fær heimild til at umsita inntøkurnar. Gjaldið kundi møguliga verið sett niður á 100 kr pr. fólk, og kann ikki koma í gildi fyrr enn í fyrsta lagi í 2027-2028, av tí at nógvar avtalur longu eru gjørdar.

Undantøk eru handilslig ferðavinna, ið td. skipa busstúrar frá cruiseskipum. Hesi eru ikki umfatað av omanfyristandandi uppskoti.

Vinaliga

Visit Runavík
Marjun Niclasen, leiðari

Heiðavegur 13
600 Saltangará